

## Rúni Samuelsen á brúnni

Ofta verður ført fram, at ungur maður, sum fer til skips, spillir sær tíðina burtur. Fert tú ikki beint í annan skúla, tá tú ert liðugur við 10. flokk, er lítil vón fyri stavn í hesum tíðum, nú samfelagið setir so stór krøv til alt og øll. Men hetta er slett ikki rætt – ella hetta nýtist ikki at vera rætt. Tað eru nógvir ungir menn, sum í staðin fyri at fara beint í annan skúla, fyrst valdu at fara í "lívsins skúla", sum skipsdekkið ofta verður rópt. Rúni Samuelsen valdi fyrst at fara í lívsins skúla, áðrenn hann fór á skiparaskúla. Longu sum 22 ára gamal førdi hann fyrstu ferð skip. Nú ísfiskatrolarin Rókur hjá Faroe Seafood herfyri kom til landið, stóð Rúni á brúnni. Í vikuskiftinum kemur seinna skipið, sum felagið hevur keypt, eisini til landið. Hetta er Lerkur – og aftur hesaferð stendur Rúni Samuelsen á brúnni. Pápi Rúna, Ólavur Samuelsen, hevur verið skipari við skipum hjá Beta, sum Faroe Seafood keypti, heilt síðan byrjan. (-vilmund)

# Rókur er komin - Lerkur á veg

**Herfyri kom annað av teimum nýggju skipunum, sum Faroe Seafood hevur keypt, á Havnina, og nú í vikuskiftinum kemur tað sienna. Skipini hava fingið nøvnini Rókur og Lerkur**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Við bryggjuna í Saltangará liggur snøggi ísfiskatrolarin, Rókur, merktur Runavík og hevur bókstavirnar og tølini FD 1205.

Rókur er annar av tveimum ísfiskatrolarum, sum Faroe Seafood hevur keypt.

Rókur er keyptur úr Írlandi, og Lerkur úr Skotlandi.

Skipini eru bygd sum systurskip, men Lerkur hevur enn ikki somu longd, sum Rókur hevur.

Rókur er eitt vet longri enn hini skipini hjá Faroe Seafood, Bakur og Stelkur.

Bæði tey nýggju skipini hava verið í Skagen, har maskinurnar eru yvirhálaðar.

Lerkur er nú eisini á veg heim og verður á Havnini í vikuskiftinum.

### Lerkur leingjast

Faroe Seafood hevur gjørt avtalu við Tórshavnar Skipasmiðju um at leingja Lerk, og hetta arbeiði fer í gongd so skjótt, skipið kemur higar til lands.

Á Tórshavnar Skipasmiðju munnu teir fara at verða lidnir við sektiónina, sum skal setast upp í skipið.

Maskinverkstaðurin FJM í Runavík setir nýggja verksmiðju í bæði skipini, og síðan er okkurt smávegis at gera í lastini.

Rókur verður klárur til fiskiskap nakað eftir hálvan august, og tá fer hann at partrola saman við Stelki. Bæði Bakur og Stelkur fara úr vinnu eitt stutt skifti hvør, meðan motorarnir verða yvirhálaðir í Klaksvík.

### Rókur og Stelkur

Ætlandi fer Bakur fyrst til Klaksvíkar, og tá fara Stelkur og Rókur at partrola. Tá so Bakur kemur aftur, og Stelkur fer norður, fara Rókur og Bakur at partrola.

Tá klassingin hjá Baki og Stelki er liðug, verður Lerkur liðugur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Tað er ungi skiparin hjá Faroe Seafood, Rúni Samuelsen, sum fyrst førdi Rók heim úr Skagen, og nú nærkast ungi maðurin landi við Lerki.

### Landaðu í morgun

Í morgun landaðu Bakur og Stelkur í Saltangará, og sum skilst vóru skipini knappliga fullfermd eftir at hava roynt í umleið eina viku.



*Rókur – annar av ísfiskatrolarunum, sum Faroe Seafood hevur keypt. Eitt snotuligt skip. Í vikuskiftinum kemur Lerkur á Havnina, sum er seinna skipið í hesum umfari. Rúni Samuelsen, skipari, er maðurin, sum hevur ført bæði skipini heim úr Skagen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*


# Ritstjórar á Skúlabókagrunninum



Tvey størv sum ritstjórar á Føroya Skúlabókagrunni verða lýst leys til setanar, so skjótt sum til ber.

Føroya Skúlabókagrunnur er eitt alment forlag, sum skipar fyri at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðalar til tað føroyska skúlaverkið. Undirvísingarmiðlar, ið eru í samsvari við tað regluverk og tær lesiætlanir, ið eru galdandi fyri undirvísingarverkið.

Ritstjórarnir á Skúlabókagrunninum eru eitt toymi, sum arbeiðir saman um at útvega dygdargóðar føroyskar undirvísingarmiðlar. Tað merkir, at neyðugt er at samstarva við bæði starvsfelagar og mong onnur til tess at tryggja so stórt fjølbroytni sum møguligt, námsfrøðiliga dygd og breidd, tíðarhóskandi málsligan búna, og at útsjónd og layout styðjar endamálið við útgávuni.

Skúlabókagrunnurin hevur ábyrgd av einum nýggjum føroyskum undirvísingarportali. Ritstjórarnir eru við í arbeiðinum at menna henda portal og at útvega eitt hóskandi úrval av talgildar miðlum. Ein partur av starvinum er eisini at veita lærarum og øðrum neyðuga kunning um føroyskar undirvísingarmiðlar.

**Praktiskt útgávuvirksemi**

Størvini, sum verða lýst leys, fevna í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi innan allar lærugreinir í fólkaskúlanum eins og ráðgeving og vegleiðing í hesum sambandi.

Ætlanin er, at teir nýggju ritstjórarnir skulu arbeiða við útgávum innan kunningarlærugreinarnar í fólkaskúlanum. Tað eru søga, samfelagslæra, landalæra, lívfrøði o.s.fr. Eisini í lærugreinunum kristni, føroyskum og fremmandum máli er tørvur á nýggjum undirvísingarmiðlum, og kunnu uppgávur á hesum økjum koma fyri.

Vilt tú vera við til at menna fólkaskúlan og tryggja, at lærarar og næmingar hava góðar undirvísingarmiðlar, so eru nógvar áhugaverdar uppgávur at fara í holt við á Skúlabókagrunninum.

**Førleikar**

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir og dyggur fakligur førleiki innan tey fakøki, sum ritstjórin fer at arbeiða mest við, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

**Løn og setanartreytir**

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 22. august 2007.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, tlf. 31 61 00.
Føroya Skúlabókagrunnur 31. juli 2007

...útvega dygdargóðar føroyskar undirvísingarmiðlar...

Føroya Skúlabókagrunnur
Lützenstrøð 4 • 100 Tórshavn • Tel 316100 • Fax 318726
helena@skulabokagrunnur.fo

grafikstudio.fo